# Kaupthing trupulleikar í Finnlandi



Uppruddingin í íslendsku bankunum heldur fram, og nú hevur Kaupthing lánt pengar at dekka finska marknaðin. Sambært Bloomberg hevur Kaupthing lánt 100 milliónir evrur frá Nordea, finska dóttirfelagnum hjá Danske Bank, Sampo Bank og OP-Pohjola Group fyri at halda sínar ábyrgdir á finska marknaðinum. Hinvegin fekk bankin ikki lán til japanska marknaðin upp á 4,4 milliónir dollarar á sonevndum samurai-obligatiónum. Landsbankinn mátti um vikuskiftið gevast við royndunum at selja síni børsmeklaraaktivir til einasta eftirverandi íslendska stórbankan, sum ikki er undir umsiting, Straumur-Burdaras. Í staðin yvirtekur leiðslan Kepler Capital Markets frá Landsbankanum, skrivar danska blaðið Børsen.

niður til privatu húsarhaldini enn, men tað kemur hon um stutta tíð. Og tað verða ikki bert bankarnir, sum verða raktir saman við meiniga íslendinginum, eisini stórar fyritøkur standa fyri skotum.

- Tað vita tey, sum fáast við íslendskt vinnulív, at har er talan um kross-ognarskap. Øll eiga hvønn annan. Falla fíggingarstovnarnir, so fylgir nógv annað við. Beint nú eru øll í eini bíðistøðu, øll bíða eftir, hvat hendir við gjaldoyranum. Íslendski tjóðbankin sigur ein kurs, danski tjóðbankin ein heilt annan, eingin veit í løtuni, hvat hendir á marknaðinum, sigur Gunnar Justinussen.

Hann vísir á, at tær stóru fyritøkurnar eru so skuldarbundnar, at har finst eingin møguleiki, tær mugu falla.

### Ikki øll kort komin á borðið

Gunnar Justinussen hevur ikki nakað beinleiðis boð upp á, hvussu íslendingar koma burtur úr kreppuni, men har skal sterkur løður til.

- Eg dugi ikki at siga tað. Íslendingar vita ikki heldur sjálvir. Dustið hevur ikki lagt seg enn, og eingin hevur fulla greiði á støðuni, og áðrenn mann kennir hana, verður trupult at vita, hvussu mann kemur burtur úr henni. Men kenni eg íslendingar rætt, liggja teir ikki leingi niðri, teir sprella aftur um nøkur ár – so ella so, sigur Gunnar Justinussen.

Eitt annað, sum kann gera tað trupult at greiða fíggjarligu fløkjuna, sum landið er komið í, er torskylda fíggjinarskipanin hjá bankunum.

- Fíggjarproduktini her yviri hava verið ógvuliga kompliserað. Tænasturnar, sum bankarnir hava bjóðað, eru sera truplar at finna út av. Nú eri eg bilmekanikari við eitt sindur aftrat, og eg havi ógvuliga ilt við at finna út og inn í ymsu skipanunum, sigur Gunnar Justinussen.

Hann sigur, at sjálvt serfrøðingarnir í bankunum hava ilt við at siga, hvat veruliga er farið fram, og tí er sera ringt at fáa eitt yvirlit yvir støðuna, sum hon er. Serliga hetta við krossognarskapunum, hvør eigur hvønn og hvør fíggjar hvønn.

- Eg eri bangin fyri, at talan verður um eina øgiliga upprudding. Nú byrja menn eisini at tosa um, hvør hevur skuldina av hesum, hvussu hetta kundi henda, so her verður nógv uppruddingnæstu tvey-trý árini, eri eg bangin fyri, sigur Gunnar Justinussen.

Og støðan er meiri ella minni kaotisk á fíggjarmarknaðinum í løtuni.

- Tú sær nú, at fíggjareftirlitið skal yvirtaka tríggjar teir størstu bankarnar í Íslandi, og har starvast kanska 15 fólk, so tey hava ongan møguleika at fara inn at reka hesar bankarnar. Tey hava heldur ongan møguleika at gera sær eitt yvirlit yvir støðuna, sigur Gunnar Justinussen.

Men tað er ikki bara í Íslandi, at støðan er óviss. Bretland hevur innifryst aktivir hjá íslendsku bankunum, og nú ljóðar, at Holland umhugsar sakarmál fyri at verja hollendskar innlánarar hjá íslendsku bankunum.

- Tað tykist, sum tað blívir við at koma okkurt nýtt fram, sum eingin veit nakað um – men sum onkur sjálvandi kennir til, so tað gongur helst rúm tíð, áðrenn øll kort liggja á borðinum, sigur Gunnar Justinussen.

# Vit merkja longu kreppuna



**Sigrið Óskarsdóttir hevur starvast 17 ár á Morgunblaðnum í Reykjavík. Hon er hálvur føroyingur, men er fødd og uppvaksin í Íslandi. Persónliga rakar kreppan ikki hana serliga hart**

**Reykjavík:** Inni á Morgunblaðnum hittu vit ein hálvan føroying, Siggu Óskarsdóttir, sum hevur starvast á blaðnum í 17 ár. Hon situr í móttøkuni. Hon heldur, at tað er ymiskt, sum kreppan hevur rakt íslendingar.

- Teir, sum eiga nógvar pengar og virðir annars í bankunum, eru als ikki vís í at fáa hendur á teimum aftur. Eisini tey, sum hava tikið stór lán nýliga til íbúð ella sethús, serliga í útlendskum valuta, eru komin í eina trongstøðu, sigru Sigga Óskarsdóttir.

Hon sigur, at støðan er ógvuliga ógreið, tað hendir okkurt nýtt hvønn dag. Trupulleikar eru við at flyta inn vørur til handlarnar, so tað byrjar at minka á hillunum.

- Tað er byrjað at minka í vøruútboði í handlunum. Tað hevur annars verið tosað um, at handlarnir høvdu vørur niðurfyri til ein mánaða, men fólk hava keypt inn undir seg, og so verður tað fyrri uppi. Men annars tekur fólk tað bara róligt, sigur Sigga Óskarsdóttir.

Hóast ringu støðuna eru fólk kortini ikki farin í panikk, men støðan ávirkar.

- Tað verða jú fleiri fólk søgd úr starvi. Bara her í húsinum eru 22 søgd úr starvi. Tað vórðu tey seinasta fríggjadag, og lagið var sera ringt, fólk grótu, tí tað verður jú ikki lætt hjá teimum at fáa arbeiði aftur, sigur Sigga Óskarsdóttir.

Hon sigur, at eisini framman undan hevur verið talan um uppsagnir á Morgunblaðnum, sum tilsamans hevur eini 110-120 fólk í starvi í dag.

### Ør bygging

Nú Morgunblaðið og Fréttablaðið eru savnað undir somu leiðslu verður tosað um, at nóg mikið er til av prentpappíri at prenta bløðini árið út, men hvat so hendir er ikki greitt fyri Siggu Óskarsdóttir.

- Men enn er samanleggingin ikki endaliga avgreidd, tí málið skal fyri kappingarráðið, sum skal taka støð til, um tvey tey størstu dagbløðini í Íslandi kunnu leggja saman. Gongur tað ikki, so veit eingin, um talan verður um nakað blað yvirhøvur. Eingin veit, men nógv verður tosað um hetta, sigur Sigga Óskarsdóttir.

Men fyri Siggu Óskarsdóttir persónliga verður neyvan talan um nakra katastrofu.

- Eg havi einki at gjalda. Eg havi fýra børn, og tey hava øll arbeiði. Men sonurin er byggimeistari og hann sigur, at hann hevur arbeiðið fram til ársskiftið, men at hann ikki veit, hvussu verður eftir tað, sigur Sigga Ósarsdóttir.

Og júst innan byggivinnuna er støðan trupul.

- Tað hevur verið bygt so ómetaliga nógv seinastu árini, og nú standa hópurin av húsum tóm. Byggimeistararnir royna at leiga íbúðirnar út, fyri at fáa nøkur oyru. Men eg vænti tað verður enn verri í so máta, vit hava bygt alt ov nógv, sigur Sigga Óskarsdóttir.

Sjálv heldur Sigga Óskarsdóttir, at orsøkin til trupulleikarnar, sum Ísland er í í løtuni, skyldast spekulatión.

- Tað eru eini 30 mans, sum hava verið uttanlands og gjørt íløgur, sum teir ikki áttu at havt gjørt. Somuleiðis hava bankarnir latið upp deildir uttanlands, sum teir heldur ikki skuldu havt gjørt. Tað hevur verið sum eitt kavablak, sum bara hevur rullað skjótari og skjótari, til tað at enda er farið í sor, sigur Sigga Óskarsdóttir.



*Sigrið (Sigga) Óskarsdóttir hevur starvast í móttøkuni á Morgunblaðnum seinastu 17 árini*